Fróðskaparsetur Føroya 40 ár:

# Fyrst og fremst Føroya Fróðskaparfelag fyri at takka

**20. mai 2005 vóru 40 ár liðin síðani Fróðskaparsetur Føroya varð sett á stovn. Dagurin varð hátíðarhildin við almennari móttøku á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni seinasta fríggjadag**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum, heldur røðu á 40 ára føðingardegnum hjá stovninum*

Umleið 150 fólk møttu til móttøkuna á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni seinasta fríggjadag í sambandi við at Fróðskaparsetur Føroya fylti 40 ár.

Fróðskaparsetur Føroya varð stovnað í 1965 við tí latínska heitinum Academia Færoensis. Tað vóru limirnir í Føroya Fróðskaparfelag, stovnað í 1952, sum tóku stig til at fáa ein lærdan háskúla í Føroyum.

Virksemi tey fyrstu árini fevndi um ársskeið í náttúrusøgu og í føroyskum fyri lærarar. Verulig akademisk útbúgving byrjaði í 1970 við heimspeki og skeiði til »filosofikum«.

Teir sum hildu røðu á móttøkuni vóru Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, og rektarin á stovninum Jóan Pauli Joensen.

Jóan Pauli segði m.a. í síni røðu: »Tað er fyrst og fremst Føroya Fróðskaparfelag fyri at takka, at Fróðskaparsetur Føroya varð stovnað í 1965. Setrið hevur hesi 40 árini útbúgvið fólk í føroyskum, í søgu og samfelagsfrøði og í náttúrufrøði og tøkni. Fleiri av hesum sita í dag í góðum størvum í tí føroyska samfelagnum og hava ávirkan á samfelagslívið. Við nýggju kunngerðini ber til at taka prógv sum bachelor, master og Ph.D., eins og á øðrum universitetum í Europa.

Lærararnir á setrinum eru á sama støði sum við onnur universitet og setrið fungerar væl og verður stýrt væl. Tað er ikki minst setursfyrisitingini fyra at takka.

Eg fari at takka øllum á setrinum fyri teirra dagliga íkast og teirra arbeiði higartil, samstundis sum eg farið at heita á øll at síggja við frískum eygum upp á framtíðina.

Eg vil ynskja okkum øllum tillukku við 40-ára degi setursins. Bæði Føroya fólki, myndugleikunum, starvsfólkum og studentum. Hjartaliga tillukku við degnum«, segði Jóan Pauli Joensen at enda.

Um kvøldið var veitsla á Náttúruvísindadeildini.

Í samband við 40 ára stovningardagin verða fyrilestrar hildnir í stóru fyrilestrarøðini »Setrið á ferð«. Í røðini vera okkurt um 40 fyrilestrar, sum vera um alt landið.



*Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, og Magnus Danielsen, professari í ravmagnsverkfrøði*



*Mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, ynskir Jóan Paula Joensen tillukku við føðingardegnum hjá stovninum*



*Hanna Absalonsen, sum hevur starvast á Fróðskaparsetrinum síðan byrjan, heilsar upp á rektaran*



*Móttøkan var á Náttúruvísindadeildini*



*Malan Marnersdóttir, professari og fyrrverandi rektari, við lítla ommusoninum*



*Jóhan Hendrik Winther Poulsen, professari, Jógvan í Lon Jacobsen, málfrøðingur, og Dorete Bloch, professari í djóralívfrøði*